Sosialurin



# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vil Kina ikki taka upp tingingar við Tibet, fari eg at umhugsa mína luttøku á OL-setanini*
*(Brian Mikkelsen, mentamálaráðharri)*

# Engla er helst burturflutt

**Fartelefonin var tað einasta tekinið frá Englu Juncosa-Höglund, men nú er battaríið tømt, og løgreglan hevur tí einki at halda seg til**

Svenskir løgreglumenn, hermenn og umleið 200 sjálvboðin hava síðani leygardagin leutað eftir teirri 10 ára gomlu Engla Juncosa-Höglund, sum hvarv, eftir at hon hevði vant fótbólt í Stjärnsund, sum er í Dalarna nakað vestan fyri Gävle.

Síðani Engla hvarv, hevur signalið frá fartelefon hennara verið tað einasta tekinið frá henni. Tað vísti, at telefonin var inni í einum skógi, men signalið var so mikið veikt, at tað bar ikki til at siga neyvt, hvar telefonin var. Í nátt slóknaði signalið, og løgreglan heldur, at battaríið í telefonini er tømt.



*Engla Juncosa-Höglund hvarv leygardagin eftir at hava verið til fótbóltsvenjing*

*(Mynd: Svenska løgreglan)*

Løgreglan í Stjärnsund heldur ikki, at Engla er vilst í skóginum.

- Var hon vilst, høvdu vit havt funnið hana. Eg haldi, at vit jagstra ein burturflytara, sigur ein talsmaður hjá løgregluni við Aftonbladet.

Í gjár leitaðu løgreglumenn, hermenn, fólk hjá heimaverjuni og ein hópur av sjálvbodnum eftir teirri 10 ára gomlu gentuni.

- Vit leita allastaðni, og vit leita bæði eftir gentuni og øðrum, sum kann hava týdning so sum ein húgva ella ein vøttur, sigur Knut Jensen hjá heimaverjuni við Aftonbladet.

### Spor av bili

Sunnudagin varð súklan hjá Englu funnin. Hon lá inni í skóginum, og tað fekk løgregluna at halda, at onkur hevur burturflutt gentuna. Løgreglan fann eisini spor frá einum bili. Tey kunnu stava frá bilinum hjá einum møguligum burturflytara, men tað er tó ikki vist, at sporini hava nakað við álopið at gera.

Sambært blaðnum Expressen hevur løgreglan illgruna um, at Engla kann vera fjald í einum húsum í grannalagnum, og tí hevur løgreglan kannað næstan hvørt einasta hús har á leiðini, men uttan úrslit.

# Brúka neyðtøkur sum vápn

**Tað er framvegis vandamikið at vera genta ella kvinna í sudanska landspartinum Darfur**

Mannarættindafelagsskapurin Human ¡Rights Watch vil vera við, at neyðtøkur verða framvegis brúktar sum skipaður ágangur ímóti tí svarta fólkinum í Darfur.

Felagsskapurin sigur, at hvørki teir sudansku stjórnarhermenninir ella hermenninir í altjóða friðarvarðveitandi herdeildini gera nóg mikið fyri at verja genturnar og kvinnurnar ímóti teimum arabisku álopsmonnunum. Tvørturímóti bendir nógv á, at sudanski stjórnarherurin styðjar álopsmenninar, og herfyri skrivaði ST í einari frágreiðing, sum sudanskir hermenn tóku lut í neyðtøkunum.

Tey seinastu fimm árini hava umleið 200.000 fólk latið lív orsakað av ófriðinum í Darfur, og tvær milliónir fólk eru flýdd heiman.



*Kynsligur ágangur hevur alla tíðina verið eitt ræðuvápn í Darfur-kreppuni, sigur Human Rights Watch*

*(Mynd: Polfoto)*

## STUTT SAGT

## Glasnost í Kuba

Tær seinastu vikurnar hava kubanski leiðarin, Raúl Castro, og stýri hansara ógildað fleiri av teimum reglum, sum hava verið galdandi í landinum í mong ár. Eitt nú sleppa kubanar nú at keypa sær elektrisk tól og teldur, fólk hava fingið atgongd til hotell og onnur ferðafólkastøð, og sum nakað spildurnýtt kunnu kubanar nú eisini fáa sær fartelefon. Samstundis ljóðar, at myndugleikarnir ætla at fara uppaftur longur. Eitt nú verður gitt, at kubanar skjótt sleppa av landinum at ferðast, og at myndugleikarnir umhugsa at loyva privatfólki at stovna egnar fyritøkur, sum tó ikki sleppa at veksa seg ovurstórar.

Tað eru tó ikki allir kubanar, sum halda tiltøkini hjá myndugleikunum vera nóg mikið. Víst verður á, at fólk í almennum starvi fáa ikki meiri enn einar 150 krónur í løn um mánaðin, og hjá fólki við so lítlari inntøku kann tað gera tað sama, hvørjar keyps- ella ferðarmøguleikar tey fáa afturat. Tí eigur tað almenna fyrst og fremst at hugsa um at taka stig, sum kunnu bøta um lønarlagið og livikorini, verður sagt.

## Elsti japanin deyður



*Kaku Yamanaka*

Fyrramorgunin andaðist Kaku Yamanaka, sum sambært almennum skjølum var 113 ára gamal og elsta fólk í Japan. Tey seinastu árini búði hann á einumn ellisheimi í býnum Yatomi, men fyrramorgunin bleiv hann so ússaligur, at hann mátti flytast á sjúkrahús. Har doyði hann seinni um dagin. Kaku Yamanaka, sum var føddur 11. desembur í 1894, bleiv elsta fólk í Japan fyri einum mánað síðani, tá javnaldurin Tsuneyo Tyonaga doyði. Hann var eisini 113 og nakað eldri enn Kaku.